## Bush missir undirtøku

Fyri tveimum mánaðum síðani vísti ein kanning, at 73 prosent av amerikanska fólkinum stuðlaðu George W. Bush, forseta, men nú vísir ein nýggj kanning, at stuðulin er minkaður niður í 57 prosent.

Tann stóri stuðulin, sum forsetin fekk í apríl, komst ivaleyst av krígnum í Irak, men nú veljararnir hava lagt tað aftur um seg, eru tað onnur viðurskifti, sum gera seg galdandi, tá tey verða spurd, hvat tey halda um forsetan. Eftir teirri nýggju kanningini er tað nú eitt nú búskaparpolitikkurin, sum fólk hugsa meiri um. 61 prosent av teimum spurdu svaraðu, at tey stúra mest fyri búskapargongdini í USA.

Sum er bendir alt kortini á, at Bush kann vinna forsetavalið næsta ár, tí einki av teimum demokratisku mótvalevnunum fær so nógvar atkvøður sum forsetin. Best umtóktur millum mótvalevnini er Joseph Lieberman, sum fær stuðul frá 40 prosentum av teimum spurdu. Næstur honum er John F. Kerry við 37 prosentum.

## Fleiri fátæk í ES

Sum er eru umleið 50 milliónir fólk í ES-londunum skrásett sum fátæk fólk, men hetta talið fer at veksa nógv, tá tey eysturevropeisku londini gerast limir í samveldinum um eitt lítið ár.

Amindo Silva, sum stendur á odda fyri arbeiðinum at bøta um fátækradømið í ES, sigur, at tá tey fátæku vórðu skrásett á fyrsta sinni í 1994, vísti tað seg, at 18 prosent av ES-borgarunum livdu í fátækradømi. Í dag er parturin 15 prosent, og sambært Amindo Silva kemst batin av betri viðurskiftum á arbeiðsmarknaðinum.

Hann sigur seg vera greiðan yvir, at uppgáva hansara verður uppaftur størri, tá londini í Eysturevropa koma uppí, men samstundis uggar hann seg við royndunum í Spania og Portugal, sum vístu, at londini fingu munandi fleiri arbeiðspláss, tá tey komu upp í ES. Tað sama kann henda í Eysturevropa, sigur Amindo Silva.

## Dýrir oljusáttmálar

Myndugleikarnir í Iran eru næstan komnir á mál við fleiri nýggjum oljusáttmálum, sum ætlandi eru einar 25 milliardir krónur verdir.

Bijan Zanganeh, oljumálaráðharri, sigur, at ætlanin er at útbyggja fleiri oljuleiðir, og at teir nýggju sáttmálarnir fara at bera í sær, at landsins oljuframleiðsla verður einar 400.000 tunnur størri um dagin, enn hon er nú.

Fleiri útlendsk oljufeløg hava samráðst við iransku myndugleikarnar. Eitt japanskt samtak hevur fingið sáttmála um at útbyggja eina oljuleið í Azadegan. Bijan Zanganeh sigur, at stjórnin tingast framvegis við bretska BP og franska Total um at útbyggja eina oljuleið í Bangestan. Hvør av sáttmálunum er einar 12 milliardir krónur verdur.

## Rendi á hval

Menninir umborð á norsku tvíkiljuni "Siste skrik" gjørdust ikki sørt skakkir, tá báturin rendi á ein hval mitt úti í Atlantshavinum nú um dagarnar. Norðmenninir vita ikki við vissu, hvat tað var fyri ein hvalur, sum teir rendu á, men teir halda, at tað mundi vera ein avgustur.

Teir fýra menninir fingu ikki skaða av samanstoytinum, men annað róðrið brotnaði. Seinni setti hitt róðrið seg fast, og tað ger, at teir kunnu bara sigla undan vindinum. Kortini hava teir segl, gerst tað neyðugt.

Tann 40 fót stóra tvíkiljan var á veg úr Azorunum til Falmouth-oyggjarnar í Suðuronglandi, tá hon rendi á hvalin. Teir vænta at koma til Onglands týsdagin í næstu viku.

# Friðarætlanin flýtur í blóði

**Ísraelska blóðið í Jaffa-gøtuni í Jerusalem var valla storknað, tá palestinskt blóð aftur fleyt í Gaza-býi. Friðarætlanin, sum báðir partar søgdu seg vilja góðtaka, er sprongd í luftina**

ÍSRAEL
*Árni Joensen*



*Hendan smágentan var í bussi nummar 14 í Jerusalem seinnapartin mikudagin. Hon var heppin*

*Mynd: Reuters*

- Eftir ísraelsku royndina at myrða Abdul Aziz Rantissi eru allir ísraelsmenn lóglig álopsmál (Hamas-leisðlan mikudagin).

- Aftan á sjálvmorðsbumbuspreingingina í Jerusalem eru øll, sum styðja Hamas, lóglig álopsmál (Útvarpið hjá ísraelska herinum í gjár).

Hamas-limurin, sum seinnapartin mikudagin fór upp í buss nummar 14 í Jaffa-gøtuni í Jerusalem við einari bumbu um miðjuna og drap 16 ísraelsmenn gav eftir øllum at døma teirri seinastu friðarætlanini mønustingin.

Hann skuldi hevna ísraelsku royndina at myrða Hamas-leiðaran Abdul Aziz Rantissi í Gaza týsdagin. Fáar tímar seinni skutu ísraelskar tyrlur rakettir inn í Gaza bý og drupu níggju palestinar.

Eitt blóðbað kemur eftir eitt annað.

### Kríggj

Í gjár kunngjørdi útvarpið hjá ísraelska herinum, at herurin hevur fingið boð um at fara í veruligt kríggj við Hamas. Sagt varð, at herleiðslan hevur fingið heimild til at nýta øll vápn í krígnum, tí nú skal Hamas oyðeleggjast einaferð med alla.

Útvarpið hjá herinum gjørdi samstundis vart við, at herurin fer ikki at taka dagar ímillum, hvørja støðu teir einstøku limirnir í Hamas hava. Tann niðasti limurin er sami fíggindin sum tann ovasti andaligi leiðarin hjá felagsskapinum, Sheikh Ahmed Yassin.

Samstundis hevur Ariel Sharon, forsætisráðharri, kunnað george W. Bush, forseta og Colin Powell, uttanríkisráðharra um, at Ísrael fer ikki at slaka ein tumma í bardaganum ímóti yvirgangi.

Hamas hevur somu støðu. Teir eru eisini til reiðar at fara í kríggj.

-Zionistarnir skulu gjalda dýrt fyri síni brotsverk. Vit helma ikki í, fyrr enn tann seinasti zionisturin er rikin av landinum, segði tann særdi Abdul Aziz Rantissi í gjár.

# USA má vera til reiðar at bumba Norðurkorea

**Ein av fremstu ráðgevunum í amerikanska verjumálaráðnum heldur, at USA má fyrireika seg til at bumba kjarnorkuverk í Norðurkorea fyri at forða landinum í at gera kjarnorkuvápn**

USA-NORÐURKOREA
*Árni Joensen*

Richard Pearle, sum er ein av fremstu ráðgevunum hjá amerikanska verjumálaráðharranum, Donald Rumsfeld, sigur, at eydnast tað ikki at noyða Norðurkorea at sleppa sínum kjarnorkuvápnaætlanum, kann tað gerast neyðugt hjá USA at bumba Yongbyon-reaktorin.

USA, Kina, Russland, Suðurkorea og Japan royna við diplomatiskum stigum at fáa stýrið í Norðurkorea at sleppa ætlanini at gera kjarnorkuvápn, men Richard Pearle sigur, at hann er als ikki vísur í, at hesar royndirnar fara at bera á mál.

- Vit mugu altíð vera til reiðar at taka okkara egnu stig, sigur hann.







*Amerikanskir hermenn framman fyri moskuna í irakska býnum Falluja. Amerikanarar ætla ikki at senda sínar hermenn til Iran, men ætla heldur at lata iranar koyra prestastýrið frá við hjálp frá eitt nú einum yvirgangsfelagsskapi og amerikanskum vápnum*
*Mynd: Reuters*

# USA ætlar at nýta yvirgangsfelagsskap ímóti prestastýrinum í Iran

**Leiðandi fólk í Bush-stjórnini ætla at fara undir eitt loyniligt átak í Iran og mæla til at stuðla einum útlagnum iranskum felagsskapi, sum frammanundan stendur á amerikanska listanum yvir yvirgangsfelagsskapir**

USA - IRAN
*Árni Joensen*

Tað er bretska blaðið Daily Telegraph, sum avdúkar ætlanina hjá leiðandi fólkum í amerikansku stjórnarumsitingini. Ætlanin hevur sín uppruna í verjumálaráðnum Pentagon.

Sambært blaðnum hava hesi skotið upp, at USA skal stuðla iranska andstøðufelagsskapin Mujaheddin-e Khalq, sjálvt um hesin felagsskapurin síðani 1997 hevur verið millum teirra, sum USA metir sum yvirgangsfelagsskapir.

MKO, sum tann iranski felagsskapurin vanliga verður róptur, hevur einar 30.000 vápnaðar menn, og USA hevur fleiri ferðir skuldsett felagsskapin fyri at hava skipað fyri bumbuspreingingum og avrættingum í Iran. USA hevur eisini skuldsett MKO fyri at hava beint fyri amerikanskum sivilum og hernaðarligum ráðgevum, sum arbeiddu í Iran í sjeytiárunum.

Men nú hevur verjumálaráðið við Donald Rumsfeld á odda mælt stjórnini í Washington til at nýta MKO í Iran, eins og USA nýtti Norðursamgonguna í krígnum ímóti Taliban í Afghanistan, skrivar Daily Telegraph. Ein kelda í Bush-umsitingini sigur við blaðið, at samstarvið við MKO verður hildið at vera tann einasti vegurin at ganga fyri at fáa eitt stjórnarskifti í Teheran eins og í Kabul á sinni.

- Munurin er bert, at hesaferð verður ikki talan um nakað kríggj. Ætlanin er at máða støðið undan prestastýrinum, og vit tosa als ikki um at leypa á, sigur keldan við bretska blaðið.

Hugsjónarliga er MKO ein samanrenning av islamismu og marxismu. Felagsskapurin fekk í mong ár fíggjarligan stuðul frá Saddam Hussein, sum á tann hátt royndi at hevna, at Iran lat shiamuslimska irakska andstøðufelagsskapin SCIRI hava høvuðsstøð í Teheran.

### Loynilig vápnahvíld

Tá USA og Bretland í vár lupu á Irak, bumbaðu amerikansk flogfør støðir hjá MKO, men eftir loyniligar tingingar gjørdu amerikanarar av at gevast við hesum álopunum. Hetta var ein loynilig vápnahvíld millum USA og ein felagsskap, sum landið sjálvt leggur undir yvirgangsvirksemi, skrivar Daily Telegraph.

Sambært blaðnum skal Donald Rumsfeld, verjumálaráðharri, vera vorðin hugtikin av hernaðarligu evnunum hjá felagsskapinum, og hann skal hava mælt felagsskapinum til at fáa sær annað navn og at samstarva við Pentagon aftur fyri loyniligan fíggjarligan stuðul úr USA.

Millum teirra, sum hava tikið undir við hugskotinum hjá Rumsfeld, er Douglas Feith, sum er ríkisskrivari í Pentagon. Hann sigst hava víst á, at tað er so langt síðani, at MKO søkti at amerikanskum málum, at tað ber til at strika felagsskapin av yvirgangslistanum. Ein annar, sum eisini sigst stuðla samstarv við MKO, er John Ashcroft, løgmálaráðharri.

### Skrivstovu í Washington

Hóast USA alment í mong ár hevur lagt MKO undir yvirgangsvirksemi, hevur felagsskapurin fingið loyvi at hava sína egnu skrivstovu í sjálvum Washington, men undir heitinum Tjóðskaparliga iranska andstøðuráðið. Í 1999 kom amerikanska uttanríkisráðið til ta niðurstøðu, at Tjóðskaparliga iranska andstøðuráðið var bert eitt eiti, og at talan í veruleikanum var um eina deild hjá MKO, og tí varð ráðið eisini skrásett sum yvirgangsfelagsskapur.

Sjálvir siga iranararnir í Washington seg vera eit demokratiskt alternativ til stýrið í Teheran, og hetta er ein tulking, sum alt fleiri leiðandi politikarar á amerikanska høgravonginum nú tykjast hava hug at góðtaka, skrivar Daily Telegraph.

Men uttanríkisráðið í Washington tekur ikki undir við hesari uppfatanini. Tvørturímóti er hugsanin har, at tað hevði verið hykl, um USA brádliga góðtekur MKO, bert tí felagsskapurin kann tæna amerikanskum áhugamálum.

Hvat George W. Bush, forseti, sigur um ætlanina hjá Pentagon, er ikki greitt, men sambært Daily Telegraph skuldi ætlanin leggjast fyri forsetan seinasta vikuskiftið.

### Trupult at fáa eina stjórn

Seinastu tíðina hevur USA fleiri ferðir lagt Iran undir at elva til ófrið í Irak, og amerikanarar hava beinleiðis sagt, at Iran hevur loyvt áðurnevnda felagsskapinum SCIRI at senda hermenn inn um irakska markið at gera seg inn á amerikansku hermenninar har. Tá ein amerikanskur hermaður doyði í einum granatálopi í síðstu viku, segði Pentagon, at tað vóru hermenn hjá SCIRI, sum høvdu skipað fyri álopinum.

Donald Rumsfeld hevur ávarað stýrið í Teheran og sagt, at tað fer at fáa avleiðingar, gevst stýrið ikki við at órógva amerikansku hermenninar í Irak.

Upprunaliga vildu amrikanararnir vera við, at tað vóru sunnimuslimakir viðhaldsmenn hjá Saddam Hussein, sum skipaðu fyri álopunum á amerikansku hermenninar. At USA nú leggur shiamuslimskar felagsskapir undir tað sama fer sambært eygleiðarum at gera tað trupult hjá USA at skipa eina stjórn í Bagdad. USA hevur roynt at stuðla hóvligar shiamuslimskar leiðarar, men uttan stórvegis úrslit. Ein teirra, Abdul Majid al-Khoei, sendu amerikanarar úr London til Irak við 100 milliónum dollarum í viðførinum, men hann hevði ikki meiri enn sett føturnar á irakska jørð, tá hann varð myrdur. Eitt annað amerikanskt evni er Ahmed Chalabi. Hann er framvegis á lívi, men fáir irakar vilja vita av honum.